

www.oljan.fo

**Jan Müller** 08 - 02 - 2012

# Statoil við sera góðum úrsliti

Statoil kunngjørdi í morgun roknskapin fyri fjórða ársfjórðing í fjør. Hann vísir, at felagið hevði 24,5 milliardir norskar krónur í avlopi samanborið við 9,7 milliardir í sama ársfjórðingi í 2010. -Statoil hevði eitt metgott úrslit, bøtti trygdina og tók týðandi stig í 2011, sigur forstjórin, Helge Lund, í sambandi við, at roknskapurin er kunngjørdur. Rakstrarinntøkurnar í fjórða ársfjórðingi vóru 182,7 milliardir norskar krónur, sum er munandi meiri enn í sama tíðarskeiði í 2010, tá inntøkurnar vóru 143,4 milliardir. Rakstrarúrslitið seinasta ársfjórðing var 60,7 milliardir samanborið við 42,8 milliardir í fjórða ársfjórðingi í 2010. Í viðmerkingunum til roknskapin skrivar Statoil, at tann stóri vøksturin stavar í høvuðsheitum frá betri prísi á olju og gassi, men har eru eisini 8,5 milliardir krónur, ið stava frá, at felagið hevur selt ognir. Felagið leggur afturat, at minni olju- og gasssøla og øktar rakstrarútreiðslur máaðu burtur av rakstrarúrslitinum. Fyri alt 2011 hevði Statoil 211,8 milliardir krónur í rakstraravlopi samanborið við 137,3 milliardir í 2010. Statoil rindaði 112,6 milliardir krónur í skatti í fjør.